# Ársfrágreiðing

# 2021



# Ársfrágreiðing 2021

Her verður í stuttum greitt frá virkseminum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd í 2021. Eisini 2021 var sera nógv merkt av koronastøðuni í heiminum og tað ávirkaði virksemið hjá RFF. Men nógv var kortini júst, sum tað eigur og vit framdu nógv átøk og framleiddu eisini nýtt tilfar.

## Ein læt lív í ferðsluni í 2021

Eftir fleiri ár við søguliga lágum deyðstølum í ferðsluni, harav 2 ár við ongari deyðsvanlukku, var ein deyðsvanlukka á føroysku vegunum í 2021. Í desember doyði ein 12 ára gomul genta í syrgiligari vanlukku á landsvegnum við Norðskála.

Einhvør deyðsvanlukka í ferðsluni er vanlukkulig. Serliga ringt er tað, tá børn eru partur av vanlukkuni.

Í alt eru 290 fólk deyð í ferðsluni í Føroyum, síðani fyrsta ferðsluvanlukkan kravdi eitt mannalív í 1928.

Eins og undanfarin ár samanbera vit okkum við nærmastu grannalond okkara. Har síggja vit at gongdin seinnu árini hevur verið jalig. Søguliga hava vit ligið væl hægri enn tey londini, sum vit gjarna vilja samanberast við, men við lágu tølunum seinastu árini, er gongdin farin at líkjast hinum norðurlondunum alt meira. Hetta er gleðiligt.

Av tí at Føroyar eru smáar og okkara hagtøl smá, kann ein álvarslig ferðsluvanlukka ávirka hagtølini ógvusliga. Vit hyggja tí vanliga eftir einum 5 ára miðaltali.

Tá vit samanbera okkum við hini norðurlondini, verða tølini brúkt við útgangsstøði í tal av deyðum í ferðsluni pr. 100.000 íbúgvar. Seinastu árini hava Føroyar ligið aftast samanborið við hini norðurlondini, men við lágu tølunum seinnu árini liggja Føroyar fremst í 2021 (tá vit hyggja eftir 5 ára miðaltalinum). Úrslitið fyri 2021 er 1,5 deyð pr. 100.000 íbúgvar (5 ára miðal). Til samanberingar var hetta talið 2,3 í 2020 og 2,7 í 2019. Bæði Noreg og Svøríki liggja undir 2 fyri 2021.

Í talvuni á næstu síðu eru tølini samanborin við hini norðurlondini. Øll tølini eru ikki endaliga staðfest. Eins og fyri 2020, tá korona ávirkaði ferðslumynstrið sera nógv, eru tølini søguliga lág í 2021. Neyðugt er at hava í huga, at Ísland, eins og Føroyar, hava smá hagtøl, og tí ávirka sveiggj í tølunum eisini serliga nógv. Tað ber kurvan eisini brá av.




## Ferðsluóhapp við fólkaskaða

Í 'Ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar 2019–2027' er høvuðsmálið, at talið av ferðsluóhappum við fólkaskaða skal vera 30% minni í 2027 við støði í tølum frá 2018. Hetta merkir nágreiniliga, at talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða skal í mesta lagi verða 21 óhapp í 2027.

Um hugt verður eftir tali av óhappum við fólkaskaða seinnu árini, síggja vit ikki somu jaligu gongd, sum við talinum av deyðsvanlukkum. Hetta talið er nevniliga ikki broytt munandi tey síðstu 10 árini, men hevur ligið á uml. 30-35 hvørt ár. Um aldarskiftið var hetta talið annars tvífalt so stórt. Og tað hendi ein stór broyting, millum annað tá promillumarkið varð broytt. Men síðani hevur talið av ferðsluóhappum við fólkaskaða verið á leið tað sama.

0-hugsjónin sigur tó, at ongin skal doyggja ella fáa varandi mein í ferðsluni í Føroyum. Tí má annað og meira til, fyri at fáa talið av óhappum við fólkaskaða enn longur niður.




Í 2021 skrásetti politiið 32 ferðsluóhapp við fólkaskaða. Tað er eitt vet lægri enn í 2020, men annars á hædd við gongdina tey seinastu tíggju árini. Av teimum 32 óhappunum við fólkaskaða vóru 8 teirra óhapp, har rúsdrekka, ella rúsevni/heilivágur var íblandaður. Hetta er eitt vet hægri enn árið fyri, tá hetta talið var 6. Aftur her eru tølini smá og viðbrekin, men rákið er ikki lovandi.

Í mun til yvirskipaða málið í ferðslutrygdarætlanini, er hetta enn ikki ein nøktandi gongd. Fyri at røkka málinum í ferðslutrygdarætlanini má annað og meira til.

Sambært ferðslutrygdarætlanini eru fremstu tilmælini til at røkka málinum í 2027 millum annað, at ein skipað **skaðakanning** verður sett í verk av álvarsligum ferðsluóhappum, og at arbeitt verður miðvíst við at fáa til vega betri **hagtøl**.

## Landsfevnandi átøk í 2021

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í 2021 framt átøk viðvíkjandi endurskinum, lyktum, gáloysni, ferð, rúskoyring og skúlabyrjan. Eisini fingu vit enn ein kokkteyl uttan alkohol. Afturvendandi tiltøkini Ferðsludagar fyri 8. flokkum, súkkluhjálmar til øll børn í 1. flokki og endurskinsvestar til yngstu skúlanæmingarnar vóru eisini partur av virkseminum í 2021. Nakrar kommunur tóku eisini av innbjóðingini at bíleggja súkkluvenjingarbreytir, so børn og vaksin í nærumhvørvinum kunnu fáa týdningarmiklar súkkluførleikar.

### Lyktaátak

Í 2021 høvdu vit lyktaátak í februar og aftur í november. Átakið er ment í samstarvi við Akstovuna. Í 2020 var átakið framt fyrstu ferð við spurnarkanningum á sosialum miðlum, har tú kanst fáa prógv sum 'Ljósatendrari'. Síðani vóru spegilsskeltir, sum gera tað lætt hjá bilførarum at kanna sínar egnu lyktir, sett upp í øllum landinum. Hetta í samstarvi við Magn og Effo.







Í november vórðu so spildurnýggjar útvarpslýsingar á øllum útvarpsrásum og á sosialum miðlum. Tríggjar útvarpslýsingar eru framleiddar, sum á eitt sindur skemtiligan hátt seta orð á tað, sum kann ørkymla bilførarar. Nevniliga tá bilarnir blenda, perurnar eru brostnar, ella tá baklyktirnar eru sløktar.




Fólk hava tikið væl ímóti átakinum og tað tykist vera sera relevant at minna fólk á at tendra lyktirnar og kanna perurnar, tí ógvuliga nógv reagera uppá átakið.

Á heimasíðu okkara ([www.rff.fo](http://www.rff.fo)) er hópin av kunning og góðum ráðum um billyktir.

**Ferð**
Í apríl mánaða endurtóku vit ferðátakið ”Halt hámarksferðina, ókey?”, sum fyrstu ferð varð framt í oktober 2019. RFF samstarvar við Betri, Landsverk og Trygd um hetta átakið, sum skal fáa fólk at hugsa um avleiðingarnar av at koyra ov skjótt. Nýtt ferðátak verður framleitt í 2022.

Boðskapurin í átakinum kom fram í filmi, sum varð vístur í Kringvarpinum, og á sosialum miðlum.

Tað er ikki bara tú, sum verður rakt/ur av eini ferðsluvanlukku, men øll kringum teg verða eisini rakt. Filmurin setir orð á óhugnaliga tankan um, hvør skal siga einum eftirsitandi barni, at mamma ikki kemur heim aftur, tí hon koyrdi ov skjótt og var í eini ferðsluvanlukku. Tíbetur veit mamman í filminum betur, tí hon hevur lurtað eftir áheitanini um at halda hámarksferðina.




Eisini varð áminning um hámarksferðina endurmálað á landsvegir á útvaldum støðum kring landið. Støðini vóru útvald eftir fortreytunum at tað eru støð, har bilar koyra ov skjótt og á flestu støðunum hevur Landsverk eisini fastar teljistøðir.



Ov nógv ferð er ein stór avbjóðing fyri ferðslutrygdina. Ov nógv ferð økir um vandan fyri at óhapp henda og skaðarnir av ferðsluóhappum verða størri og ógvusligari, tess skjótari koyrt verður. Vit hava spurt føroyingar um teirra vanar í ferðsluni og tað sæst at aldur og royndir hava ávirkan á, hvussu skjótt vit koyra. Soleiðis sæst at yngri bilførarar hava lyndi til at koyra skjótari enn eldri, meiri royndir bilførarar.

## Atferð




Vit hava eisini kannað sambandið millum hugburðin til ferð og hvussu ofta fólk uppliva vandastøður í ferðsluni. Sambandið er hugvekjandi. Av teimum, sum vanliga siga seg koyra 100 km/t ella skjótari á landsvegi, hava 44 % verið tætt við at enda í einum ferðsluóhappi seinastu trý árini. Meðan 20% hava verið í einum ferðsluóhappi. Fyri tey, ið siga seg vanliga koyra 80km/t ella spakuligari á landsvegi eru hesi tølini ávikavíst 25% og 8%.

## Vandastøður- ferð



**Rúsátak**

Hóast hugburðurin til rúskoyring er munandi bøttur seinastu nógvu árini, og nógv tey flestu siga seg taka frástøðu til rúskoyring, henda framvegis ferðsluóhapp orsaka av rúskoyring. Og tíverri hoyra vit eisini javnan um at politiið steðgar fólki, sum ikki burdu sett seg handan róðrið. Tað er munur á hugburði og atburði! Og tí er framvegis týdningarmikið at fremja rúsátøk.

Á sumri, og aftur um jóltíðir, endurtóku vit rúsátakið ”Eg koyri teg, tú koyrir meg” sum byggir á grundarlagið at vit øll hava ábyrgd at tryggja, at øll koma trygt heim og at vit skiftast um at vera tann, sum koyrir. Átakið er úrslit av hugskotskapping millum ung, sum varð gjøgnumførd í november 2020.




Rúsátakið á sumri var í høvuðsheitinum framt á sosialum miðlum, har filmurin varð nýttur. Í november og desember endurtóku vit átakið við fleiri kappingum við sera góðum vinningum til góða sjaførin. Í útvarpssendingini ’Ónsvakt’ var sms-stormur tá vit burturlutaðu stóran og góðan vinning. Eisini fingu vit sera góða eksponering á sosialu miðlum okkara við adventskapping.

Lyklaringar, við boðskapinum frá átakinum vóru framleiddir til endamálið og hesir eru m.a. nýttir ísv. kappingarnar og eisini hevur politiið býtt út í sambandi við kanningar í ferðsluni.



**Kokkteylur uttan alkohol**
Triðja árið á rað samstarvaðu vit við Bláa Kross Føroya um alkoholfríar drykkir at bjóða teimum, sum skulu koyra heim eftir veitslu. Hesaferð gjørdi kokkurin Gutti Winther ein 'Espressoskeyk', sum fekk sera góða eksponering í morgunsendingini hjá KVF. Innihaldið í 'Espressoskeyk' er m.a. kakaomjólk, kondenserað mjólk og kaffi. Saman við kokkteylunum frá undanfarnu árunum ('Heilt appilsinfríur' og 'Sýrutripp') hava vit nú eina leskiliga viftu av alternativum drykkum til tann góða sjaførin.

Heldur ikki í 2021 eydnaðist tað at hava almennar smakkiroyndir av kokkteylinum. Hesum forðaði korona fyri. Men vit kunnu erpa okkum eitt sindur av, at síðani samstarvið um kokkteylar uttan alkohol byrjaði, er úrvalið av alkoholfríum vørum eksploderað í handlum, sum selja gerandisvørur. Neyvan eru okkara kokkteylar orsøkin, men tað er ein týðilig ábending um, at vit hava rakt ein marknað, sum tørvur var á.

Uppskriftir og mannagongdir at gera tínar egnu 'Heilt appilsinfríu', 'Sýrutripp' og 'Espressoskeyk' eru at finna á heimasíðu okkara.

Enn er ikki avgjørt, um ein nýggjur kokkteylur verður gjørdur í 2022.



**Skúlabyrjan**

Í august 2021, tá skúlarnir byrjaðu aftur, framdi RFF átak í samstarvi við kommunur, har bilførarar vórðu mintir á at ansa eftir skúlabørnunum við skúlarnar. Hetta við plakatum. Endamálið var at gera vart við, at í sambandi við skúlabyrjan eru aftur fleiri børn í ferðsluni, og eisini børn, sum kanska eru nýggj í ferðsluni og hartil smá og tískil ikki síggjast so væl.

Í nøkur ár hevur Ráðið fyri ferðslutrygd boðið kommununum at luttaka í átøkum. 16 kommunur vóru við í átakinum hesa ferð. Hesar eru: Eiðis -, Eystur -, Fuglafjarðar -, Hvalbiar -, Klaksvíkar -. Kvívíkar -, Porkeris -, Runavíkar -, Sjóvar -, Sunda -, Sørvágs -, Tórshavnar -, Tvøroyrar -, Vága -, Vágs – og Vestmanna kommuna.

Í 2022 fara vit eisini at bjóða kommununum samstarv um skúlaátak og vit hava fingið nýggj fitt børn at mynda plakatirnar.



**Gáloysni**
Í oktober 2021 framdu vit spildurnýtt átak um gáloysni. Við boðskapinum ”Koyr. Bara.” heita vit á tann, sum koyrir bil, um at hugsavna seg um at koyra bil. Og bara tað.

Boðskapurin kom fram í filmi, sum var vístur í sjónvarpi, á alnótini, í miðlum og biografi. Í filminum síggja vit tann ørkymlaða bilføraran, sum so fegin vil hugsavna seg um at koyra bil, men tað er so freistandi at lata seg órógva – serliga av telefonini. At enda steðgar hann øllum órógvi og hugsavnar seg um at koyra. Bara. Tí alt annað er býtt.




Tá um gáloysni ræður, er handhildin telefon ein avgjørdur vandafaktorur. Og hóast tú fært bót fyri at tosa í handhildna telefon, skrivar politiið sera ofta bøtur til bilførarar fyri júst hetta brotið.

Síðani 1. januar 2019 hevur tað í Danmark givið klipp í koyrikortið, um tú verður tikin fyri at tosa í handhildna telefon, meðan tú koyrir. Umframt eina bót, sum er hægri enn tann føroyska. Tilmæli nr. 54 í Ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar er, at hetta eisini skal setast í gildi í Føroyum.

Seinnu árini hava vit spurt føroyingar um teirra hugburð til nýtslu av handhildnari telefon, meðan koyrt verður. Parturin av fólki, sum siga seg ongantíð tosa í telefon, meðan tey koyra bil er 45% og er hetta talið lægri enn undanfarnu árini. Tey, sum siga seg gera hetta av og á, ella ofta/altíð er 21% og er hetta talið hægri enn seinnu árini.

Aldursbýtið vísir, at millum yngru bólkarnar er talið á teimum, sum av og á, ella ofta/altíð nýta handhildna fartelefon, meðan tey koyra, munandi hægri, enn millum eldru bilførarar.

Í aldursbólkinum upp til 29 ár, siga 29% seg brúka telefonina, meðan tey koyra av og á, ella ofta/altíð. Talið fyri tey 30-39 ára gomlu er 28%.


Atferð
Hvussu ofta
0% 10% 20% 30% 40% 50% 60% 70% 80% 90% 100%
...koyrir tú ávirkað/ur?
98%
...tosar tú í fartelefon uttan snigil ella headsett, ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari/koyrir?
45% 35% 14% 7%
...brúkar tú fartelefonina til lesa og senda sms, lesa/senda teldupost ella til spøl v.m. ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari?
72% 19% 7% 3%
...koyrir tú skjótari enn tað er loyvt?
11% 25% 36% 28%
Aldrin
Sjáldan
Av og á
Ofta/altíð
Veit ikki
LOÐUR


Atferð
...tosar tú í fartelefon uttan snigil ella headsett, ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari/koyrir?
30% 25% 20% 15% 10% 5% 0%
15-29 ár: 18% 11%
30-39 ár: 15% 13%
40-49 ár: 22% 3%
50-59 ár: 13% 5%
60-75 ár: 3% 3%
Av og á
Ofta/altíð
...brúkar tú fartelefonina til lesa og senda sms, lesa/senda teldupost ella til spøl v.m. ímeðan tú sjálv/ur ert bilførari?
30% 25% 20% 15% 10% 5% 0%
15-29 ár: 9% 5%
30-39 ár: 15% 6%
40-49 ár: 9% 0%
50-59 ár: 3% 2%
60-75 ár: 0% 1%
Av og á
Ofta/altíð
LOÐUR

Men samstundis, sum fólk í alt ov stóran mun siga seg javnan tosa í handhildna fartelefon, meðan tey koyra bil, meta tey eisini at fartelefonin er ein tann fremsta orsøkin til, at fólk fáa skaða í ferðsluni. Bara ov nógv ferð, verður mett størri skaðaorsøk.




Lítið er at ivast í, at tørvurin á framhaldandi átøkum á hesum økinum eru ógvuliga týdningarmikil.

**Endurskin**
Ein týðandi og afturvendandi partur av arbeiðinum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd eru endurskin. Endurskin fáast í øllum hugsandi sniðum og týpum og tey eru sum heild løtt at fáa hendur á. Nógva staðni fáast tey púra ókeypis og RFF hevur í nógv ár latið endurskin frá Betri trygging og Trygd.




Í vetur framleiddu vit eina røð av endurskinum við búmerkinum hjá RFF, við boðskapinum 'Lat teg rætt í'. Við hesum vilja vit minna á týdningin á at nýta endurskin, og at tað skal vera ein náttúrligur partur av garderobuni (jakki, húgva, vøttir, endurskin).

Vit hava altíð endurskin at lata á skrivstovuni og javnan heita einstaklingar, skúlaflokkar og onnur á okkum um at senda endurskin.

# Afturvendandi átøkini

## Ferðsludagar fyri 8. flokkum

Ferðsludagarnir í 2021 vóru hildnir seinni enn vant. Korona forðaði okkum at hava tiltakið fyri 8. flokkum á vári, soleiðis sum siður hevur verið seinastu nógvu árini. Men í 2021 varð tiltakið í staðin útsett til september/oktober. Tá gingu næmingarnir í 9. Flokki.

Fyrstu ferðsludagar fóru av bakkastokki í 1998 og hava verið hildnir at kalla á hvørjum ári síðani. Hesi árini er tiltakið tillaga og dagført, men í høvuðsheitum er yvirskipaða málið tað sama - at læra um vandar í ferðsluni, avleiðingar av avgerðum okkara og tvístøðum um hvat kann gerast fyri at fyribyrgja og hvat er 'rætta' reaktiónin, tá skaðin er hendur. Tiltakið er samskipað av Ferðslutrygd og stuðlað av Trygd og Betri Trygging.















**1-1-2 dagar**

Seinnu árini hava 1-1-2 dagar verið skipaðir, har løgreglan, brandstøðin, sjúkraflutningstænastan og Ferðslutrygd møta elstu barnagarðsbørnunum. Orsaka av korona vóru tíverri heldur ongir 1-1-2 dagar í 2021, men í 2022 verður væntandi 112-tiltak í Havn í majmánaða.

**Súkkluhjálmar og endurskinsvestar til 1. floksnæmingar**

Sum helst tey einastu í heiminum fáa øll børn í Føroyum, sum fara í 1. flokk, hvør sín súkkluhjálm. Hjálmarnir verða latnir í samstarvi við Betri og Trygd. Eisini fáa teir yngstu næmingarnir (1. flokkur, ella forskúli) endurskinsvest frá Betri.

Her eru tað næmingar í Oyndarfjaðar skúla, sum hava fingið hjálmar. Í 2021 vóru hjálmarnir hvítir og silvurlittir.




Seinnu árini eru nógvir hjálmar latnir og sniðini eru nýggj á hvørjum ári. Vit hava eintøk av flestu hjálmunum, sum eru latnir, og teir mynda eina litfagra og sjarmerandi ferðslutrygdarsøgu.



## Annað virksemi í árinum, ið fór

**Royndarverkætlan við súkkluvenjingarbreytum**
Seinnu árini hava vit sæð alt fleiri súkkla í ferðsluni. Tað er heilsugott, umhvørvisvinarligt og kann vera eitt gott alternativ til bilin.

Ráðið fyri Ferðslutrygd ynskir at stimbra súkkluførleikan við at betra um súkklufrálæru og harvið betra um ferðslutrygdina hjá súkklandi.




Á ársfundinum í 2021 frættu vit um Súkkluvenjingarbreytir. Breytin kann brúkast inni, ella úti – alt eftir hvat veðrið loyvir. Og hon kann brúkast av vaksnum eins væl og av børnum. Súkklubreytin ger súkklaran betri at:

- halda javnvág við fráferð ella steðg.
- geva tekin uttan at skinkla.
- ætta seg uttan at skifta kós.
- stýra súkkluni í spentum støðum

Súkkluvenjingarbreytirnar taka ikki nógv pláss, tá tær ikki eru í nýtslu og eru léttar at seta upp. Brúksvegleiðing á føroyskum fylgir við breytini, sum eisini inniheldur uppskot til stigaskipan at brúka, um man ynskir tað.

Vit bjóðaðu kommununum at ogna sær súkkluvenjingarbreytir og vit samskipaðu eina bílegging, sum tríggjar kommunur tóku av. Vágs kommuna, Tvøroyrar kommuna og Sunda kommuna.

Aðrar kommunur hava eftirfylgjandi eisini víst súkkluvenjingarbreytini áhuga, men vóru av ymsum orsøkum ikki partur av felags bíleggingini.

Støða er ikki tikin til eina nýggja felags bílegging í 2022, men møguligt er eisini at bíleggja einstakar breytir beinleiðis frá veitaranum.

**Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni**
Síðani 2000 hevur 1. sunnudagur í juli verið dagurin, har vit minnast tey, ið vit mistu í ferðsluni. Minningardagurin var hesaferð tann 4. Juli.

Ráðið fyri Ferðslutrygd stuðlar tiltakinum, saman við fyritøkum og einstaklingum. Ingi Gunnarsson samskipar tiltakið, tá sjálvboðin á hvørjum ári leggja blómutyssi á støð, har ferðsluvanlukkur hava kravt mannalív.

Í 2021 varð tiltakið skipað eitt sindur øðrvísi, tí hesaferð vóru øll 289 blómutyssi løgd á Tinghúsvøllin í Havn.





**Kemm Poulsen er farin**
Í februar 2022 andaðist Kemm Poulsen. Hóast ikki beinleiðis starvssettur, var hann partur av RFF í góð tríati ár. Íkast hansara var serliga at skipa fyri rundan um upplýsingarátøk, framsýningar o.a. Serliga tók hann sær nógv av Hvølvusi og Gølli í arbeiðinum at vísa hvussu týdningarmikið tað er at nýta trygdarbelti. Eisini gjørdi hann fleiri lýsingarfilmar fyri RFF.






RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

**Kári Thorsteinsson takkar fyri seg**
Formaðurin í starvsnevndini hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd seinastu nógvu árini, Kári Thorsteinsson, takkar nú fyri seg í nevndini.

Kári kom í starvsnevndina vegna Føroya Landfúta í 2005. Í síðani 2007 hevur hann verið formaður ráðsins.

Vit takka Kára fyri tíðina og hansara áhaldandi íkast til arbeiðið í RFF ferðslutrygdini at frama. Blíðan byrð.



## Framlítandi virksemi RFF

Yvirskipað verður framhaldandi arbeiðið hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd skipað við støði í 'Ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar 2019-2027'.

Týdningarmesta stigið fyri framman er, at seta í verk skaðakanning av ferðsluvanlukkum í Føroyum og at betra um skipaða hagtalsskráseting. Hetta eru fremstu tilmælini í ferðslutrygdarætlanini og verða tey mett at vera týdningarmestu amboðini at náa málinum um 30% færri ferðsluóhapp við fólkaskaða í 2027, við støði í tølunum frá 2018.

Tilmælið um skaðakanning er ikki nýtt og øll londini kring okkum, hava langt síðani sett á stovn skipaðar kanningar av álvarsligum ferðsluvanlukkum. Mælt verður til at vit finna íblástur í íslendsku og donsku skipanini, og harvið finna eina samanseting av skaðakanning, sum hóskar til okkara samfelag. Saman við skipaðari skaðakanning verða betri hagtøl væntandi ein natúrligur ágóði, umframt at tað kann sjónliggera hvussu verandi skrásetingar kunnu betrast.

Tað sum tó hevur avgerandi týdning fyri at hetta málið kann náast er, at okkara politikarar lofta tilmælinum og gera tað fyrireikandi arbeiðið, sum skal til, fyri at skaðakanningarskipan verður sett á stovn í Føroyum. Hesum vil RFF eisini arbeiða við.

Ráðið fyri Ferðslutrygd fer harumframt, við støði í dagførdu ferðslutrygdarætlanini, at arbeiða miðvíst við teimum tilmælum í ferðslutrygdarætlanini, sum RFF varar av – m.a. átøk, undirvísing og hugburðskanningar. Harumframt er ætlanin at byrja regluligar kanningar av nýtslu av trygdarbelti, umframt at seta meiri ítøkiligt fokus á átaksøkið 'prutl'. Herundir at stuðla undir betri og størri útbreiðslu av undirvísingini kring landið, og skaðahagtøl fyri hendan ferðslubólkin.

Neyðugt er framhaldandi at virka fyri átøkum at betra um vanarnar í ferðsluni. Hetta í góðum stevi við aðrar partar, sum á hvønn sín hátt arbeiða fyri betri ferðslutrygd. Átøk mótvegis stóru skaðafaktorunum í ferðsluni (ferð, gáloysni og rúskoyring) halda sostatt fram, eins og afturvendandi tiltøkini mótvegis børnum og ungum.

*18. mars 2022*
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*